Gu› er eingin erkvisin bókhaldari

PRÆDIKA. »Ta› er spell, at evangeliini í dag ver›a brúkt sum ambo› móti me›menniskjum okkara«. Solei›is tók Ólavur Rasmussen, prestur, saman um bo›skap sín í prædikuni á jóansøku í Vági



Ólavur Rasmussen, prestur í Hvalba, helt sunnudagin á jóansøku eina prædiku, i› vakti ans millum fólk í Vágs kirkju og útvarpslurtarar (savnsmynd)

Høgni Mohr

Tey ortodoksu kristnu fingu av álvara ein frammaná, tá i› Ólavur Rasmussen fór á prædikustólin í Vágs Kirkju sunnudagin á jóansøku.

Grei›a og ítøkiliga prædikan hjá hvalbiarpresti rein djúpt vi› kirkjufólk og vágbingar annars, sum høvdu útvarpslurti› tendra› í køkum, stovum og sólgyltum túnum. Prædikan elvdi sumsta›ni í Vági til prát og or›askifti um, hvat i› kristindómurin júst sn‡r seg um.

Sambært kirkjufólk á sta›num, tyktist semja vera um, at Ólavur Rasmussen hev›i sagt ta›, i› tey sjálvi hildu, men bara ikki høvdu or› fyri. Og at hann hev›i duga› at sagt ta› á ein sera gó›an hátt.

Prædikan var› ikki hildin at vera hvøss, men heldur ein hjartalig og meira skemtingarsom uppger› vi› n‡ggja afturhaldssinna›a ráki› í føroysku fólkakirkjuni.

Gó›a undirtøku

Or›ini hjá Ólavi Rasmussen spruttu úr líknilisinum um ríka mann, sum til ber at lesa um í Lukasarevangeliinum. Teksturin var til 1. sunnudag eftir Trinitatis.

Ólavur Rasmussen, prestur, sigur ta› vera umrá›andi, at gera vart vi›, at kirkjan umbo›ar ráki›, sum byggir á næstrakærleika og humanistismuna hjá Jesusi.

Eftir sjáldsomu prædikuna hava fleiri fólk sett seg í samband vi› Ólav, og øll hava tiki› undir vi› bo›skapinum í prædikuni.

\- Eisini gomul missiónsfólk í Vági takka›u fyri or›ini, sigur Ólavur Rasmussen, sum hevur arbeitt óvanliga leingi vi› prædikuni.

Her prenta vit prædikuna í heilum líki:

Jóansøkuprædika ár 2000

Ta› eru nógvir mátar at lesa Bíbliuna uppá. Helst líka nógvir, sum ta› eru borgarar í landinum.

Men í kristnu søguni, eru ta› grundleggjandi tveir mátar at lesa hana uppá: annar er at lesa hana sum ein turran lógartekst, i› ver›ur brúktur ímóti me›menniskjum; hin er at lesa hana sum tann gle›iliga bo›skapin, i› endurskapar lív og felagsskap millum menniskju. Stutt sagt: ta› er lógin mótvegis kærleikanum, ta› er Jesus mótvegis tí kalda bókstavinum.

Jesus ger sjálvur, fer› eftir fer›, upp vi› lógarátrúna›in, sum hann beinlei›is sigur vera eina hóttan mótvegis menniskjanum; hann vil t.d. heldur bróta sabbatina og bjarga lívi›, enn at gera sambært lógunum í Gamla Testamenti og vir›a sabbatina og lata lív fara; hann vil heldur nerta vi› ein spitalskan og geva hesum lív og felagsskap, enn at gera sambært lógunum í Gamla Testamenti og halda seg burtur frá tí spitalska - tí skitna menniskjanum - tátí›ar AIDS-sjúklinginum. Hann vil heldur taka smábørnini í favn og vælsigna tey, enn at gera sambært lógunum í Gamla Testamenti og halda fingrarnar burtur frá dálka›um, syndugum verum.

Øll henda protestin hjá Jesusi mótvegis sjálvrættvísu, lívskøvandi lógarreligiónini kann samanfatast í einum setningi: »Tann, i› reinur er, hann kasti tann fyrsta steinin«.

Onkursvegna havi eg illgruna um, at okkurt b‡r undir hjá teimum, sum altí› hava svar uppá, hvussu Várharra vigar me›menniskja› á himmalsins vágskál; ein illgruna um, at tey ikki halda Várharra vera nóg gó›an, hann er ikki nóg strangur, hann hevur ov lætt vi› at taka ímóti menniskjum vi› opnum ørmum - hann dugir ikki nóg væl at sortera.

Vit liva í dag í einum samfelag, sum í mangar mátar er kalt og kyniskt. Pengavir›i er eftirhondini ta› einasta felagsvir›i›, sum eftir er. Ta› er ikki so nógv ein spurningur um, hvør tú ert, sum ein spurningur um, hvussu nógv tú eigur í bankaboksini, sum avger, hvussu nógv vir›i tú hevur sum menniskja í samfelagnum.

Og tess meira vit í blindum gó›taka pengavir›i sum ta› einasta felagsvir›i, mannaættin hevur eftir, tess meira umrá›andi er ta› vi› einum bo›skapi, sum spreingir øll materialistisk mørk; einum bo›skapi, sum rópar út í heimin, út í oy›imørkina, at eitt vir›i ber yvir øllum: At lívi› er heilagt, tí at ta› er skapa› av Gu›i. At uttan kærleikan, uttan grundleggjandi vi›urkenning av hvørjum ø›rum, doyr menniskja›.

Ta› er hetta, dagsins tekstur sn‡r seg um. Tann ríki ma›urin livir bert fyri sínar egnu sakir. Hann slaktar me›menniskja› á egoistiska og sjálvrættvísa altarinum. Lukas ger púra greitt, at henda ásko›an ber ongum lívi uppi. Tvørturímóti: henda ásko›an leggur lívi› í oy›i.

Ein djúpur ironiskur t‡dningur liggur í or›alagnum hjá Lukasi. Eg ivist ikki í, at ríki ma›ur hevur veri› ein trúgvur gestur í halgidóminum, hann hevur enntá takka› Gu›i fyri sítt ríkidømi, tí hann førir samtalu vi› sína egnu sál og hann samgle›ist enntá vi› sína egnu sál um, at hon hevur nóg miki› ni›urundir í nógv ár fram. Ríki ma›ur tosar vi› sínar pengar, sum vóru teir Gu›.

Men har er hvørki pláss fyri Gu›s kærleika ella næstrakærleika. Ta› er tann ironiska tragedian, lívslygnin.

Eitt ta› mest bíbilska ævint‡ri› í heimsbókmentunum, er ævint‡ri› hjá H.C. Andersen um tann nakna keisaran. Ta› gongur uppá stás hjá keisaranum og mannfjøldini, sum hei›rar hann, til drongurin rópar: »Hann er nakin...«.

Hetta er nærum ein fullkomin mynd av dagsins teksti. Í or›ingini: »Tín dári!« avdúkar Lukas, at ríki ma›ur, bæ›i innan og uttan, er nakin.

Ta› er ein bíbilskur tanki, at lívi› er naki›. Eins nakin, vit koma úr mó›urlívi, eins nakin fara vit úr aftur lívinum. Hetta er galdandi fyri øll, høg sum lág. Og ta› er eisini ein bíbilskur tanki, at teir størstu klovnarnir, sum ganga á tveimum beinum, eru tey, sum halda seg vera fínari ella betri enn hini.

Hetta er eisini eitt tema, sum gongur sum ein rey›ur trá›ur gjøgnum Halgubók.

Kristni heimspekingurin, Søren Kierkegaard, er kanska tann, sum hevur spælt mest upp á hesar tangentarnar í bíbliuni. Og ta› er ikki minst Lukas evangelii›, sum hevur givi› Kierkegaard íblástur, tí at fáur hevur sum Lukas avdúka› ta naknu sjálvgle›ina. Bøkurnar hjá heimspekinginum Kierkegaard y›a í láturligum persónum, sum dúva á lívslygnir og følsk vir›i.

Í dagbókunum hjá sær filosoferar Kierkegaard um slíkt, sum honum er fyri í gerandisdegnum. Eitt nú, tá i› hann á Vestara Kirkjugar›i í Keypmannahavn, har hann plagdi at ganga túr, fekk eyga á ein gravstein, sum avdúka›i, at ta› ikki var hvør sum helst, i› har lá. Kierkegaard kendi mannin, og visti, at hann var tiltikin ó›ur eftir jør›, ella jar›arspekulantur, sum Kierkegaard kallar ta›. Men ma›urin var eisini ein frommur harri, sum í sínum borgarliga lívi hev›i røkt tey fínastu embætini í juridiska hierarkinum. So gravsteinurin var avtagla›ur í titlum. Hetta er akkurát naka› fyri Kierkegaard; tann láturligi borgarin, sum ikki vil vi›urkenna sítt nakni, men tekur titlarnar vi› sær í grøvina. Tá Kierkegaard kemur heim skrivar hann í dagbókina: Her hvílir háháttvirdi, losjulimur av hægstu grad, av Frí›riki kongi 7. til riddara sligni hægstarættardómari N.N. Og so skoytir Kierkegaard uppí, vi› sínum spíska penni: »Me›an hann livdi, hev›i hann ikki anna› enn mold millum oyruni, »og det har han stadigvæk...«

Ta› stutta av tí langa er, at vit eru øll í sama báti. Vit fáa einki vi› okkum í grøvina, tí har fara vit líka so nakin, sum tá vit komu úr mó›urlívi. Sagt bíbilskt, so setir hetta okkum øll upp á pláss. Hetta sta›festir, at ta› er so óendaliga stórur munur á Gu›i og menniskjanum, at eingin hevur loyvi at seta seg sum kíla millum ta› einstaka menniskja og Várharra; hetta kann ikki sta›festast nóg ofta, serliga í hesum tí›um, nú summi eru so skuffa›i av, at Gu›s hús er opi› fyri øllum menniskjum.

Er ta› naka›, sum N‡ggja Testamenti› sn‡r seg um, er ta› naka›, sum skapar øsing, tá Jesus Kristus virkar her á jør›, so er ta› tá hann br‡tur ni›ur slíkar fundamentalistiskar sannleikar, sum jødisku prestarnir brúktu mótvegis me›menniskjunum, sum ikki hildu, hugsa›u og vóru sum teir.

Lukas evangelistur leggur ikki fingrarnar ímillum. Tú hoyrir ein mann, sum tosar vi› einum klókum hjarta, heldur enn einum køldum heila.

Tú fert inn í eina ver›, sum er stór, har er rúm fyri øllum tankum og kenslum, tú hoyrir allatí›ina ekkói› av Lukasi, at alt ta› trongskygda og sjálvrættvísa oy›ileggur og bindur ni›ur samskifti› millum menniskju, sum ríki ma›ur er dømi um. Lukas evangelistur er sannførdur í sínum hjarta um, at uttan ein kærleiksfullan Gu› ste›ga›i alt lívi› upp.

Tú sært allatí›ina, hvussu ney›ugt ta› er at gera upp vi› allar fundamentalistiskar ásko›anir, sum byrgja lívi› inni í lógum og paragrafum. Lukas evangelistur vísir allatí›ina á, at Jesus setti lívi› og kærleikan til me›menniskja› hægri enn lógirnar. Lógirnar eksistera snøgt sagt ikki í hesum evangeliinum, tí at lívi› er alt ov fínt og vi›kvæmt, til at ta› kann setast upp í paragrafir. Og lívi› er eisini alt ov stórt til at ta› kann minkast ni›ur til at snúgva seg um allar møguligar regluger›ir, sum jødiskir fundamentalistar gingu so høgt uppí. Regluger›ir, sum serliga høvdu til endamáls at binda ni›ur og stoyta me›menniskju frá sær.

Og so ta› heilt grundleggjandi hjá Lukasi, at letur tú lívi› upp í hendurnar á fundamentalistum og teirra lógartrúgv, so gert tú Gu› ov lítlan, alt ov ússaligan, tú reduserar í roynd og veru Gu› til ein erkvisnan bókhaldara. Og er ta› naka›, sum Gu› ikki er, so er ta› ta›.

Ríki ma›ur vildi so fegin redusera Gu› til ein bókhaldara - men ta› miseydna›ist sjálvsagt.

»Solei›is gongst tí, sum savnar sær ríkidømi og ikki er ríkur í Gu›i«. Bíbilska vendingin »at vera ríkur í Gu›i« hevur ein bæ›i há-tí›arligan og jar›bundnan t‡dning. Ein stillføran t‡dning, kunnu vit kanska siga. Ta› er aftur hesin stóri heimurin, sum letur sinni› upp - sum opnar tær naknu kenslurnar, tann nakna longsulin eftir fyrigeving, sáttan og felagsskapi - og letur alt ta› ókenda upp í Gu›s livandi hendur. Henda ótømandi keldan, sum vit øll eru partur av, líkamiki› hvørji vit eru, ella hvussu vit eru.

Í hesum goymist tann ey›mjúka og vakra barnatrúgvin, sum eg haldi, vit øll, tá i› á stendur, í okkara loynikømurum, leingjast eftir.

Lat meg so enda vi› at siga, at Lukas evangelistur leggur ovurstóran dent á, at Gu›s fyrigevandi kærleiki eigur at síggjast aftur í okkara vi›urskiftum vi› me›menniskja›. Ta› er eisini bo›skapurin í hesi frásøgnini.

Tí er ta› so miki› meira spell, at evangeliini í dag ver›a brúkt sum ambo› móti me›menniskjum okkara. Amen.

Ólavur Rasmussen, prestur

Summartónar 2000

Komandi dagarnar verða hesar konsertir:

28. juni, mikudagur:

kl. 12 uml. 17 Klæmintsgjógv í Hesti

John Tchicai (saksofon) og Høgni Klakkstein (slagverk).
Norðlýsið siglir av Havnini kl. 12.00
Bíleggið beinleiðis frá TUTL: 314558

kl. 17.00 Norðurlandahúsið

Håkan Hagegård (baryton) og Elisabeth Boström (klaver)
Verk eftir: Regin Dahl, Wilhelm Stenhammer, Ture Rangström, Edvard Grieg, Jean Sibelius, Frank Martin, Johannes Brahms, Maurice Ravel og Hugo Wolf.
Atgongumerki kr. 100,-

kl. 22.00 Katólska kirkjan í Havn

Einar Jóhannesson (klarinett)
Ókeypis atgongumerki

29. juni, hósdagur:

kl.13 uml.18 Klæmintsgjógv í Hesti

Håkan Hagegård (baryton)
Norðlýsið siglir av Havnini kl. 12.00
Bíleggið beinleiðis frá TUTL: 314558

kl. 20.00 Christianskirkjan í Klaksvík

Hymnia (kór), Flemming Windekilde (stjórnar)
Ókeypis atgongumerki

kl. 20.00 Listaskálin, Tórshavn

Anne Mette Stæhr (klaver)
Atgongumerki kr. 80,-

30. juni, fríggjadagur:

kl. 20.30 Norðurlandahúsið

Havnarkórið, Ólavur Hátún (stjórnar) - Ginnungagap, Tórbjørn Dyrud (stjórnar)
Atgongumerki kr. 80,-

kl. 20.00 Fuglafjarðar skúli

Håkan Hagegård (baryton) og Elisabeth Boström (klaver)
Ókeypis atgongumerki.

kl. 20.00 Trongisvágs skúli

Anna Klett (klarinett), Hege Waldeland (cello) og Johannes Andreassen (klaver)
Ókeypis atgongumerki.

1. juli, leygardagur:

kl. 11.30 Havnar kirkja

Elsa Súsanna Dalsgaard (alt) og Helgi Breiner Petersen (orgul)
Ókeypis atgongumerki.

kl. 16.00 Listaskálin, Tórshavn

Anna Klett (klarinett), Hege Waldeland (cello) og Jens Hørsving (klangregi)
Atgongumerki kr. 80,-

kl. 19.30 Norðurlandahúsið

Austrian Art Ensemble, Sandnes Orkesterforening og føroyskir einstakir tónleikarar.
Havnarkórið og aðrir sangarar úr Føroyum
Dania Sonans og Ginnungagap, Yaacov Bergman (stjórnar)
Verk eftir Johannes Brahms m.a. "Ein Deutsches Requiem".
Atgongumerki kr. 150,-

2. juli, sunnudagur:

kl. 16.00 Norðurlandahúsið

Austrian Art Ensemble, Sandnes Orkesterforening og føroyskir einstakir tónleikarar.
Havnarkórið og aðrir sangarar úr Føroyum
Dania Sonans og Ginnungagap Yaacov Bergman (stjórnar)
Verk eftir Johannes Brahms m.a. "Ein Deutsches Requiem".
Atgongumerki kr. 150,-

kl. 14.00 Listaskálin

Anna Klett (klarinett), Hege Waldeland (cello) og Jóhannes Andreasen (klaver)
Atgongumerki kr. 80,-

3. juli, mánadagur:

kl. 20.00 Bygdarhúsið, Skálavík

Anna Klett (klarinett), Hege Waldeland (cello) og Jens Hørsving (klangregi)
Ókeypis atgongumerki

Atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum, í Kunningarstovuni í Havn og við dyrnar á konsertstaðnum.

Í Norðurlandahúsinum fæst eisini avmarka nøgd av atgongumerkjum, sum galda fyri allar konsertirnar, fyri kr. 250,-

Sí annars serligan bókling við skránni, heimasíðuna hjá Norðurlandahúsinum: www.nlh.fo ella tekstvarpið s. 651.

Norðurlanda HÚSIÐ í Føroyum